# Danska arbeiðsloysið veksur

Frá februar til mars mistu 10.600 danir arbeiðið, og tá er broytingin umroknað til fulltíðarstørv. Tað merkir, at í mars vóru 82.100 arbeiðsleysir danir skrásettir í arbeiðsloysisskipanini ella 2,9 prosent av teirri arbeiðstøku fjøldini. Teir seinastu mánaðirnar hevur goingdin verið tann, at talið á arbeiðsleysum monnum er vaksið skjótari enn talið á arbeiðsleysum kvinnum, og hetta stendur við. Danska hagstovan sigur, at 3,4 prosent av monnunum eru arbeiðsleysir, og tað er 0,9 prosentstig oman fyri arbeiðsloysistalið hjá kvinnunum.



# Rýma úr Meksiko

Meksiko er eitt sera væl umtókt ferðamannaland, men svínakrímið hevur fingið ferðafólk at rýma haðani, meðan onnur, sum skuldu hagar, hava valt at finna sær eitt annað stað at halda frí í. Reuters skrivar, at dagliga plaga umleið 70.000 útlendsk ferðafólk at ferðast um altjóða flogvøllin í Meksiko Býi, men at hetta talið er minkað eina helvt ta seinastu vikuna. Árliga plaga 23 milliónir útlendsk ferðafólk at vitja Meksiko, men meksikanska ferðavinnan ber nú ótta fyri, at tað talið fer at minka nógv orsakað av svínakríminum. Hotellini siga seg longu hava mist 60 prosent av bíleggingunum.

# Huðrar á heimssjónleikarafestival

**Føroyski leikbólkurin Huðrar, sum í fjør setti upp leikin Othello, skal í summar luttaka á heimsins største sjónleikarafestivali fyri áhugasjónleik. Festivalurin verður í Monaco í døgunum 16.-27. august**

LEIKLIST
*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*



*Sum einasti leikbólkur út norðurlondum, er Huðrar boðin at luttaka á heimsins største sjónleikarafestivali fyri amatør sjónleik. Festivalurin verður í Monaco í døgunum 17.-26. august. Á festivalinum fer Huðrar at spæla Othello í týðingin eftir Hanus Kamban*

*Savnsmynd*

Í tíðarskeiðnum 17.-26. august í ár verður heimsfestivalur fyri áhugasjónleik í Monaco. Ein bólkur úr Føroyum hevur fingið tilboð um at luttaka, og er tað føroyski leikbólkurin, Huðrar, sum í fjør setti upp leikin Othello eftir William Shakespeare. Í august í fjør luttók Huðrar á NEATA festivalinum í Riga, og varð har sæddur og seinni boðin at luttaka á festivalinum í Monaco. Sum einasta land í norðurlondum.

- Vit hava fingið eina innbjóðing frá festivalinum, og eru vit einasti bólkur úr norðurlondum, sum sleppur við. Hetta er heimsins størsti festivalur av hesum slagnum, og tað er ótrúliga torført at sleppa við á ein tílíkan festival, sigur Sóley Danielsen, ein av leikarunum í Huðrar.

Lítið hevur verið at hoyrt frá Huðrar síðan uppsetingina av Othello. Men áðrenn bólkurin fer avstað, fara tey at spæla nakrar stuðulssýningar í Norðurlandahúsinum, umframt at hava onkrar spontanar uttandura sýningar.

- Onkra broyting mugu vit gera, tí allir leikararnir eru ikki tøkir, tá vit skulu til Monaco. Tí fara vit at hava eina opna upptøkuroynd tann 7. juli. Hesin skal altso koma inn fyri ein av mannligu leikarunum.

Ætlanin er at arbeiða hart alla summarfrítíðina við Othello. Huðrar skal nevniliga eisini til Íslands áðrenn bólkurin fer til Monaco.

24 lond eru higartil skrásett at luttaka á festivalinum í Monaco, og er hetta størsti festivalur fyri semiprofessionellar leikarar. Bólkarnir, ið eru við á festivalinum, skulu framføra á egnum máli, og verður Othello sostatt sýndur í týðing eftir Hanus Kamban.

# Sjónleikarhúsið saknar lutir

**Tað eru ikki komnir so nógvir lutir inn til marknaðardagin hjá Sjónleikarhúsinum, sum undanfarin ár. Eftir ætlan skal peningurin, sum kemur inn, nýtast til nýggja úthurð og ein leka í køkinum**

MENTAN
*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*

Áhugin fyri at lata Sjónleikarhúsinum í Havn lutir, er ikki líka stórur í ár sum undanfarin. Enn eru tveir dagar eftir at lata lutir inn, men leygardagin skuldi allir lutir verið komnir á rætta stað, tí tá letur Sjónleikarhúsið dyrnar upp fyri árliga marknaðardegnum. Men higartil er talið av lutum langt frá tí, sum plagar at koma inn til marknaðardagin.

- Vit fara kortini at hava marknaðardag, sum vit plaga. Umframt loppumarknað verður køkutombola, fiskibrunnur, kaffi og vaflur at fáa. Enn eru tveir dagar eftir, og tað vísir seg ofta at fólk koma í síðstu løtu, so tað kann vera at fólk koma við onkrum spennandi lutum, sigur Karin Djurhuus, næstformaður í nevndini í Sjónleikarhúsinum.

Sjónleikarhúsið tekur í dag og í morgin ímóti klæðum, lutum og innbúgvi. Um okkurt spennandi innbúgv ella lutur kemur inn, verður kanska skipað fyri uppboðssølu. Peningurin, sum kemur inn, skal nýtast til at halda húsið við líka. Júst nú er tað ein leki í køkinum, sum skal bøtast, og hurðin norðureftir skal skiftast út.

- Vit halda, at tey, ið velja at stuðla marknaðardegnum, eru fólk, ið vilja húsinum væl. Tí halda vit tað vera uppá sítt pláss at pengarnir fara aftur til húsið, sigur Karin Djurhuus.

Lutirnir, ið ikki vera seldir, verða sorteraðir eina ferð afturat. Ein partur fer oman í søluna hjá Reyða Krossi, nakað verður koyrt burtur, og ein lítil partur verður goymdur í Sjónleikarhúsinum til árið eftir.



*Borðini við lutum hava onkuntíð verið meir rokað enn tey eru í dag, nú bert tveir dagar eru til stóra marknaðardagin hjá Sjónleikarahúsinum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*